**KANIN**
Brún kanin við hangioyrum burturblivin við Norðskála tann 1. apríl. Um nakar hevur sæð hana, vinarliga ring
*Tlf. 258283*

**KVÍGA TIL SØLU**
Góð kvíga til sølu, kálvar 15. apríl 2006.
*Tlf. 211839, Martin á Fløghamri*

**ER TAÐ NAKAR**
ið hevur ein kanariufugl at selja mær? Vinarliga ring
*tlf. 361666*

**PERSARAKETTA**
hvít, ljóst brún og myrkabrún, verður latin djóravini.
*Tlf. 457026 ella 584176*

**HVØLPUR TIL SØLU**
Ein fittur golden retriver tíkarkvølpur til sølu, bert til djóravin.
*Tlf. 583203 eftir kl. 16.00*

**SERA GÓÐIR**
border collie seyðahundahvølpar til sølu. Mamman og pápin eru barnavinarlig og sera rólig.
*Tlf. 262851*

**5 FITTIR KETTLINGAR**
undan lítlari kettu. Mamman er barnavinur. Leita eftir einum góðum heimi. 4 hvítur og 1 flekkutur. Áhugað kunnu ringja
*277769 ella 423425*

## Fundir

**KSR**
Ársaðalfundur verður í neystinum á Válinum leygardagin 22. apríl kl. 17.00.
*Nevndin*

**FRÁ FRAMTÍÐINI**
Aðalfundurin, sum skuldi vera leygardagin 8. apríl, er úsettur til mánadagin 10. apríl kl. 19.00. Um ikki nóg nógv møta, verður eykaaðalfundur 1/2 tíma seinni.
*Arbeiðsmannafelagið Framtíðin*

## Húsarhaldstól

**FLUGUSKÁP TIL SØLU**
Nýtt hvítt fluguskáp til sølu. Hædd 90 cm. br. 60 cm, djúpd 45 cm.
*Tlf. 317760*

**NORCOLD FRYSTISKÁP**
hædd 85 cm. 90 l. so gott sum nýtt, til sølu fyri 2.000 kr.
*Tlf. 513338/317362 ella 322096*

**EITT KØLISKÁP TIL SØLU**
sum kann standa á borðinum, lítið brúkt, hædd 85 og b. 55. Prísur 1.000 kr.
*Tlf. 513338/317362 ella 322096*

**HVÍT EIMHETTA**
til sølu fyri 1.000,- kr.
*Tlf. 581054*

**KÓKIPLÁTUR**
4 kókiplátur við stálrammu 50x58 cm. at fella niður í borð, til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 581054*

**KØLISKÁP VIÐ FRYSTIBOKS**
140cm høgt. Køliskápið er 100cm og frystiboksin 40cm. Til sølu fyri 700 kr. Best eftir kl. 15.
*Tlf. 264658*

## Innbúgv

**SKÁP TIL SØLU**
Stórt klædnaskáp úr lútaðari furu, 3 hurðar, tann mittasta v/ spegli til sølu fyri 1.000 kr. Nýprísur 3.000 kr. Selist vegna flyting.
*Tlf. 226254*

**HILLASYSTEM TIL SØLU**
Hillasystem úr ahorn v/ dupultari glashurð til sølu vegna flyting fyri 700 kr. Nýprísur 2000 kr.
*Tlf. 226254*

**INNBÚGV TIL SØLU**
Innbúgv bíliga til sølu.
*Tlf. 523555*

**BAÐIKAR**
Vaks, wc-kumma, blandingsbattarí, radiatorur, hurðar.
*Tlf. 509007*

**BLÁGRÁ HORNASOFA**
Lítið brúkt til sølu fyri 1600 kr.
*Tlf. 373279 ella 227860*

**TIL SØLU**
Etagusong við botnum til sølu fyri 200,-
*Tlf. 333574/253702*

**TIL SØLU**
Møblar til sølu sum eru keyptir frá Frú S.
*Tlf. 505154*

**TIL SØLU**
Ahorn sofaborð 80x130 cm. við hill undir. 4 stólar, krombein, svart setur. Bil barnastólur og ein Philips babyalarmur.
*Tlf. 254266*

**FYLLINGSHURÐAR**
Gamlar massivar fyllingshurðar, 6 stk. holmát (80x200 cm) karmur fylgir ikki við.
*Tlf. 503667*

**BRÚKT SONG**
við madrassu 90x200 cm til sølu fyri 500,00 kr.
*Tlf. 269038*

**ARKIVSKÁP**
Eigur onkur eitt arkivskáp at selja mær?
*Tlf. 224444*

**REOLSYSTEM**
Pent myrkt reolsystem í 2 sektiónum við ljósi í. Selist fyri 300,- kr.
*Tlf. 582303*

## Matur

**TIL SØLU**
Turrur fiskur, lippur, kjálkar, ræstur fiskur og fiskaflak.
*Tlf. 267167*

**KJØT**
Turr ærstjógv bíliga til sølu.
*Tlf. 586316*

## Pløgg

**BRÚÐARKJÓLI TIL SØLU**
Flottur brúðarkjóli til sølu, støðd 36/38.
*Tlf. 251515 ella 320325*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
vakur tvíbýttur konfirmatiónskjóli til sølu, støðd 32/34.
*Tlf. 251515 ella 320325*

## Samband

**SAMBAND YNSKIST VIÐ KVINNU**
53-59 ár. Eg eri 60 ár. Búgvi í Havn, føli meg so eina. So nú er bert at skriva til
Sosialin,
box 76,
110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 2313/2*

## Sjavs

**SJAVS**
Sjavskapping verður sunnudagin kl. 17.00
*NSÍ*

**SJAVSKAPPING**
verður á Svangaskarði mánadagin 10. apríl kl. 18.30.
*Tofta Ítróttarfelag*

**SJAVSKAPPING**
verður í felagashúsinum fríggjakvøldið 7. apríl kl. 18.45.
*Eldrafelagið Nón*

## Súkklur

**ATV 4-HJÓLS 150 CCM**
er ongantíð brúktur, er innpakkaður enn. Hetta er ein fín arbeiðsmaskina við króki, til sølu fyri 15.995 kr.
*Tlf. 421787/253000*

**MOTORSÚKKLA TIL SØLU**
Motorsúkkla til sølu Honda CX 500.
*Tlf. +298 228450*

**PEUGEOT SKUTARI**
til sølu fyri 8000 kr., hann er frá maj 2005 og er sera væl viðfarin. Skutarin er í Føroyum.
*Tlf. 0045 31207282, spyr eftir Dan*

**HARRASÚKKLA**
ynskist bíliga til keyps.
*Tlf. 310550*

**MOTORSÚKKLA TIL SØLU**
Ein sera vøkur Suzuki Intruder, árg. 1997, 800cc, svørt og crom, til sølu. Choppari km 10.000.
*Tlf. 215047/315047*

## Tónleikur

**KNAPPHARMONIKA TIL SØLU**
Bugari-Armando, 120 bassar
*Tlf. 444762*

**TRÅÐLEYS**
Shure SM58 mikrofon til sølu fyri 2.000,-
*Tlf. 210604*

**AKKUSTISKUR GUITARI TIL SØLU**
av merkinum Seagull model S6+CW. Prísur 4.500,- nýprísur 8.900,-
*Tlf. 210604*

**EL-GUITARI TIL SØLU**
Ein Squier Telecaster Affintity series by Fender. Lítið brúktur til sølu fyri bert 1500,-
*Tlf. 222962*

## Ymiskt

**TIL SØLU**
Baðikar, wc kumma, vask, bidet, blátt, til sølu.
*Tlf. 224653*

**TIL SØLU**
Stálvask 46x40x14 cm 400 kr. Einkultur radiatorur 80x55 cm. 400 kr.
*Tlf. 317114*

**TIL LANDBRÚK OG SPÆL**
ATV 150 ccm, 4-hjóls motorsúkkla við sleipikrók, lítið brúktur, til sølu fyri 14.500 kr. v/ mvg.
*Tlf. 421787/253000*

**HEY TIT**
Eg átaki mær at undirhalda til borðhald, so sum brúdleyp, føðingardagar v.m. Havi nógvar royndir.
*ja_lisberg@hotmail.com*

**BERNINA SEYMIMASKINA TIL SØLU**
Model Virutvosa 163, lítið brúkt, til sølu fyri 6.000 ella hægsta boð yvir.
*Tlf. 315821*

**EIN OLJUMÁLNINGUR**
Av Ingolvi av Reyni, 75x62 cm, til sølu
*Tlf. 448506*

**FRÁ FLOKSMONNUM**
Í samband við dystin ÍF-B36 sunnudagin 9. apríl koyrur bussur úr Gundadali kl. 13.30.
*Floksmenn*

**ÁRASØLA!**
Mikudagin 3. mai 2006 verður árasøla í Frelsunarherinum í Vági, har yvir 100 vinningar eru at vinna.
*Frelsunarherurin*



Forelskað?
Vís tað í Sosialinum







# Barsskor seljast til Íslands fyri eina krónu

### Hann verður nú latin til eitt savn í Akranesi

**STRANDFERÐSLA**
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Ætlanin er nú at selja gamla strandfaraskipið, Barsskor, til Íslands.
Men tað verður ikki nakað, sum hvørki Strandferðsla ella landskassin skora kassan av, tí ætlanin er at selja hann fyri eina krónu.

Barsskor er bygdur í Akranesi í Íslandi í 1929 og Kristian Davidsen, stjóri í Strandferðsluni, sigur, at íslendingar hava spurt seg fyri um tað ber til at fáa hann aftur til Íslands, nú hann er lagdur.

Barsskor røkti siglingina út í Kalsoy, men síðani nýggj ferjulega varð gjørd og Sam fór at sigla, hevur hann ligið í Klaksvík.

Hann er illa farin og má pumpast hvønn dag fyri ikki at fara til botns, sigur Kristian Davidsen.

Í Akranesi er ætlanin at hann skal gerast til eitt savn.

Annars hevur Strandferðslan fingið nakrar fyrispurningar upp á Barsskor og okkurt tilboð er eisini latið inn frá onkrum, sum eru sinnað at keypa hann fyri 70.000-100.000 krónur.

Men stjórin á Strandferðsluni sigur, at tað er ein politisk avgerð, at hann skal latast til hetta siðsøguliga endamálið í Íslandi.

Um hann verður seldur til Íslands, veldst um, antin Løgtingið góðtekur tað ella ikki og tað málið er til viðgerðar í hesum døgum.


*Líkt er nú til at gamla strandfaraskipið, Barsskor endar sínar dagar í Íslandi, har ætlanin er at gera hann til eitt savn*